

Progressivir súkklarar braka ígjøgnum hýggjuskotna landslagslist




Myndlist, ið setur úr gildi tyngdarmegina




»Hjólveldi«



Pappírsbátarúgva - brot úr installatión

allýsingum av hugtakinum verður dentur lagdur á, at videolistin, tó at hon tekur støði í livandi myndum, ikki er tað sama sum eksperimental filmslist. Hesin prinsipielli spurningur kann tykjast undrunarsamur, men bert inntil tú fært veruligan áhuga fyri videolist, sum á summum framsýningum er vónbrótandi samlík við vanligar stuttfilmar við veruligari (mimetiskari ella veruleikahermandi) hendingagongd.

So er ikki við installatiónunum hjá Tóroddi Poulsen, ið sum heild eru konseptuellar, komprimeraðar og einfaldar, júst sum tílíkar installatiónir skulu vera. Hetta er eitt nú galdandi fyri videolistaverkið hjá Tóroddi Poulsen "Sig tað bundna", sum varð gjørt til eina Várframsýning fyri nøkrum árum síðani, og sum tíverri ikki riggaði á ferniseringini hjá Steinsetingum.

## Sig tað bundna

Hetta videolistaverkið hevur nevniliga stóra ávirkan á sjálva framsýningarupplivingina og kann virka sum eitt slag av fatanarlykli til alla framsýningina. Filmsekvensurin er ein tíma langur og ferfaldaður soleiðis, at filmurin heldur á í fýra tímar, áðrenn hann endar og aftur byrjar av nýggjum. Filmurin lýsir listamannin í bringumynd og svørtum sólbrillum à la Warhol, meðan hann upp í saman murrar da di da di da di da di da di. Og tó at hetta í fyrstani tykist sum tilvildarligt fyri ikki at siga svakligt møsn, gerst skjótt greitt, at rútman er afturvendandi í hvørjari reglu, og at tað enntá kundi ljóðað sum jambisk pentametur, ið eitt nú Shakespeare brúkti m.a. í sínum sonettum.

Tað kann at byrja við hava ligið ein atfinning í verkinum av teimum, sum siga tað bundna, men nógv áhugaverdari enn hetta er sjálv endurtøkan og tann reglubundna skipanin, sum verður sett upp, fyri ikki at tosa um øll tey mongu smáu frávikini, sum hoyrast betri og betri og sum geva hvørjari reglu sín egna dám, á sama hátt sum vit síggja tað í nógvum av myndunum, har súkklur, stólar og fet eru sett upp í skipanir við áhaldandi frábrigdum, ið standast av, at allar súkklur, stólar og fet eru fríhendistekningar, sum eru teknaðar ein og ein. Tekningarnar hjá Tóroddi Poulsen minna eins og installatiónirnar ikki so lítið um hansara yrkingar, ið taka teg á bóli og seta úr gildi tyngdarmegina, eins og tær innihaldsliga ofta snúgva seg um listarliga skapan.

Ein hin besta installatiónin á framsýningini hjá Tóroddi Poulsen er eisini tann einfaldasta við einum kusti, sum er í ferð at feia eina rúgvu av pappírsbátum saman. Installatiónin er vøkur og poetisk og sýnir á sama hátt og hinar installatiónirnar forkærleika listamansins fyri at nýta og endurnýta ready made lutir úr gerandisdegnum sum t.d. gøtukustar, plastikktoyklemmur, bomm, íspinnar osfr. í listaverkum sínum, ið vit ikki vanliga seta í samband við tað fínu og hámentanarligu myndlistina.

Installatiónirnar hóska ómetaliga væl í rúminum og íbirta framtíðarvónir um eina stóra føroyska installatiónsframsýning, ið skuldi verið uppløgd at havt í Listahøllini. Á henda hátt inspirerar framsýningin Steinsetingar, ið er sum eitt listarligt omanlop, sum í staðin fyri at køva og oyðileggja, letur upp og skapar nýggjar myndlistarligar rásir.

**Steinsetingar. Listahøllin á Skipasmiðjuni.
Opið til sunnudagin 19. apríl hvønn dag frá klokkan 14.00 til 18.00. Myndaskrá á donskum fæst til keyps fyri 100 krónur**